# Høgni tók sjálvur málið aftur

**LøgLøgtingið má sleppa at viðgera málið um rættartrygd borgaranna óheft av persónligu støðu landsstýrismanins, sigur Høgni Hoydal, løgtingsmaður. Hann tók sjálvur málið aftur í síni tíð sum landsstýrismaður, vísir Kristian Magnussen, tingmaður á**

ARVARÆTTUR
*Edvard Joensen*



*Tað ber ikki til, at persónliga meiningin hjá einum landsstýrismanni skal forða Løgtinginum at sleppa at viðgera eitt stormál, heldur Høgni Hoydal*

Høgni Hoydal tók sjálvur málið um foreldrarætt og rættindi hjá samkyndum aftur, tá hann í síni tíð skuldi leggja tað fyri Løgtingið, sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður. Munurin er bara tann, at Høgni Hoydal varð hóttur til tað, og at Jógvan við Keldu tekur tað burtur úr heildini av sínum eintingum.

Kjakið um málið um foreldrarætt og arvarætt er farið heilt av sporinum, heldur Høgni Hoydal, løgtingsmaður, sum harmast um, at persónliga hugsanin hjá einum landsstýrismani skal gera, at Løgtingið ikki sleppur at viðgera eitt so stórt mál, sum viðkemur grundrættindunum hjá øllum borgarum landsins.

Høgni Hoydal, løgtingsmaður Tjóðveldisfloksins, harmast um, at Løgtingið ikki sleppur at viðgera eitt ávíst mál, í hesum førinum málið um arvarætt og onnur viðurskifti í samband við skrásett parlag hjá samkyndum, tí avvarðandi landsstýrismaður av persónligum grundum ikki vil leggja málið fyri Løgtingið.

Høgni Hoydal vísir á, at tað er skeivt at taka ein part burtur úr eini danskari lóg, sum annars verður løgd fyri Løgtingið.

Tað ger, at hesin parturin av lógarverkinum altíð fer at spøkja aftur og verða drigin inn í mestum eitthvørt orðaskifti uttan natúrliga at hoyra til har.

### Endurtøka

Nú er hetta ikki fyrstu ferð, at júst hetta málið um arvarætt og foreldramyndugleika er á breddanum. Tað var tað eisini í 1999, tá talan var um at yvirtaka málsøkið. Men ta ferðina kom málið heldur ikki til viðgerar í tinginum. Júst tí, at tann parturin, sum snýr seg um rættindi hjá samkyndum, gekk summum tingmonnum ov nær samvitskuni.

Landsstýrismaðurin, sum tá umsat málið, var júst Høgni Hoydal, sum í dag heldur, at tað er tíð uppá, at málið verður avgreitt í Løgtinginum.

– Hatta er tvætl og bara ein máti at royna at fáa skapt kaos í samgonguni, sigur Kristian Magnussen, tingmaður Javnaðarfloksins. Men vil Høgni Hoydal hava rok í samgonguni, so má hann finna okkurt smartari mál enn hatta til tess. Tað er eingin, sum er áhugaður í at fáa rok um slíkt mál, sigur Kristian Magnussen.

Soleiðis er ikki, sigur Høgni Hoydal. Hann vísir á, at tá hann í síni tíð vildi leggja málið fyri Løgtingið, varð serliga ein samgonguflokkur, sum hótti við samgongusliti, um málið kom fyri. At tað ikki varð borið í Løgtingið tá, komst av, at frágreiðingin,sum skuldi fylgja við, var ikki klár, og málið fall sostatt burtur.

### Meira umfatandi

Høgni Hoydal sigur, at tað er stórur munur á málinum, sum tá var ætlað at leggja fyri Løgtingið, og tí, sum í dag verður arbeitt við.

– Ta ferðina skuldu vit yvirtaka alt málsøkið og gera tað føroyskt. Í dag verður tosað um at seta eina danska lóg í verk, sum kortini ikki er nøkur heil donsk lóg, tí tann parturin, sum snýr seg um juridisk rættindi hjá samkyndum, skal takast burturúr.

Eisini er stórur munur, tá tosað verður um foreldrarætt og -myndugleika, vísir Høgni Hoydal á.

Í lógarverkinum, hann arbeiddi við, var hugsað um tørvin og rættindini hjá barninum. Sum er, verður meira atlit tikið til rættindini hjá foreldrunum, vísir Høgni Hoydal á. Hann sigur, at honum dámar betri, at hugt verður at norksari enn danskari lóggávu, tí norðmenn seta tørvin hjá barninum fremst í slíkum málum.

### Harmiligt

Høgni Hoydal harmast um, at Løgtingið ikki sleppur at viðgera málið um rættindi hjá samkyndum, soleiðis at tað kann verða avgreitt einaferð fyri allar, og fólk fær at vita, hvørja støðu Løgtingið hevur.

Hetta málið verður blandað upp í mestsum hvat sum helst orðaskifti, og tað verður ikki at batna, sum frálíður. Og í nógvum førum er tað púra misskilt eisini.

– Tað vísir seg sera ofta, at fólk viðgera hetta málið sum um at talan er um at víga fólk av sama kyni í kirkjuni. Men tað hevur hetta als einki við at gera yvirhøvur, vísir hann á. Her verður bara tosað um jura.

Men sum støðan er, liggur tað bara og bíðar eftir einum ordiligum orðaskifti, sum vit ikki hava dirvi at taka.

Hann vísir aftur, at hann reisir hetta fyri at fáa rok og kaos í samgonguni.

– Eg eri fullvæl greiður yvir, at samgongan er ikki samd um hetta málið, sigur hann. Men eg eri líka greiður yvir, at í mínum egna flokki er heldur ikki semja. Og eg vil enn einaferð undirstrika, at tað, eg føri fram, er mín persónliga meining um málið og ikki ein flokksstøða. Men vit eiga at tora at taka hetta orðskiftið, so málið kann verða avgreitt endaliga, sigur Høgni .



*Høgni Hoydal vil bara vera smartur og brúkar eitt mál, sum hann sjálvur hevur handfarið á júst sama hátt, til at skapa kaos í samgonuni. Men hann má finna sær okkurt annað til tað, tí hatta hoppa samgongufók ikki uppá, sigur Kristian Magnussen*



# Latið okkum hyggja frameftir

**Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, hevur ikki stórvegis hug at nýta meira tíð til at viðgera skerjingarnar í miðfyrisitingini. –Avgerðin er tikin, og nú eiga vit at hyggja frameftir, sigur hann**

SKERJINGAR Í MIÐFYRISITINGINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Tað hevur ongantíð verið settur spurningur við ella ein kanning gjørd um tað var rætt at økja miðfyrisitingina í síni tíð, og tí síggi eg ikki, at tað er neyðugt við teimum stóru kanningunum, nú vit skerja hana, sigur Jóannes Eidesgaard*

Landsstýrið hevur skert uttan mið og mál. Hetta var ein av niðurstøðunum hjá ráðgevanum í Innlendismálaráðnum, Bergi Berg, um hópuppsagnirnar í miðfyrisitingini. Hann fýltist á, at avgerðin hjá landsstýrinum er tikin uttan, at landsstýrið hevur gjørt sær greitt, hvør vinningurin og missurin er við sparingunum í miðfyrisitingini.

Vit hava spurt løgmann, Jóannes Eidesgaard, um skerjingarnar í miðfyrisitingini eru gjørdar uttan, at landsstýrið nágreiniliga hevur kannað, hvørjar avleiðingar vórðu.

### Tolir tað

Løgmaður vísir enn einaferð á, at landsstýrið hevur tikið avleiðingarnar av verandi búskaparstøðu, og tí vórðu skerjingarnar framdar í miðfyrisitingini. Hann metir, at føroyska miðfyrisitingin er sterk og tolir at verða skerd.

– Avgerðin er tikin, og nú eiga vit at hyggja frameftir. Eg haldi ikki tænir nøkrum at viðgera málið víðari. Vit vóru noyddir at fyrihalda okkum til búskaparliga veruleikan, og tí varð avgerðin tikin. Landsstýrið hevur mett, at fyrisitingin er sterk, og at hon, hóast hon er lítil sammett við onnur samfeløg, er nóg stór til føroysk viðurskifti, sigur hann

*Átti landsstýrið ikki at kanna avleiðingarnar, áðrenn avgerðin varð tikin?*

– Jú tað er eitt sjónarmið, so væl sum okkurt annað. Skuldu vit analysera hvørja funktión hjá teimum 160 størvunum í miðfyrisitingini var bróðurparturin av 2005 farið afturum, áðrenn nøkur avgerð varð tikin. Eg kann ikki siga annað enn, at avgerðin er tikin og eg eri vísur í, at vit fáa fyrisitingina at rigga líka væl sum áður, sigur løgmaður.

Spurdur, um tað ikki hevði verið hóskandi við eini kanning av miðfyrisitingini, áðrenn avgerðin um skerjingarnar varð tikin, svarar løgmaður, at politiska metingin hevur verið, at fyrisitingin er nóg sterk, og hon tolir skerjingina

– Tað hevur ongantíð verið settur spurningur við ella ein kanning gjørd um tað var rætt at økja miðfyrisitingina í síni tíð, og tí síggi eg ikki, at tað er neyðugt við teimum stóru kanningunum, nú vit skerja hana, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Endurmeting í gongd

Síðan bygnaðarbroytingar í fyrisitingini hjá Finn Norman Christensen vórðu settar í verk í juni mánaði í 1996 hava røddir javnan verið frammi um, at tað er neyðugt at endurskoða bygnaðin.

Jóannes Eidesgaard greiðir frá, at landsstýrið er farið í holt við eina endurmeting av fyrisitingini.

– Arbeiðið byrjaði alt fyri eitt, tá vit tóku við. Ein allýsing er gjørd av miðfyrisitingini, og vit eru í fer við at endurskoða ráðini og nevndirnar, sum eisini hoyra undir fyrisitingini. Endamálið er sjálvsagt at fáa eina so vælvirkandi fyrisiting sum gjørligt, sigur løgmaður.

# Okkum vantar haldgóðar grundgevingar

**Formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana saknar haldgóðar grundgevingar frá samgonguni fyri skerjingini í miðfyrisitingini. – Um tú skal fremja sparingar í miðfyrisitingini og ráðunum má tað verða ein fortreyt, at tú kannar, um tú kanst verða hesi fólkini fyriuttan, men í hesum føri fyriliggur eingin kanning, sigur andstøðutingmaðurin**

SKERJINGAR HJÁ TÍ ALMENNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Um tú skal fremja sparingar í miðfyrisitingini og ráðunum má tað verða ein fortreyt, at tú kannar, um tú kanst verða hesi fólkini fyriuttan. Tað er í ordan at siga fólki úr starvi, um tú hevur eina kanning sum vísir, at tú kanst vera fólkini fyriuttan, men hesum føri fyriliggur eingin kanning, sigur Jenis av Rana.*

*Mynd: Savnsmynd*

Andstøðutinglimurin og formaður Miðfloksins, Jenis av Rana, heldur lítið um framferðarháttin hjá landsstýrinum í samband við skerjingarnar í miðfyrisitingini. Hann heldur tað er burturvið at skerja miðfyrisitingina uttan, at landsstýrið hevur kannað hana gjøllari.

– Mær dámar ikki framferðarháttin. Um tú skal fremja sparingar í miðfyrisitingini og ráðunum má tað verða ein fortreyt, at tú kannar, um tú kanst verða hesi fólkini fyriuttan. Tað er í ordan at siga fólki úr starvi, um tú hevur eina kanning sum vísir, at tú kanst vera fólkini fyriuttan, men hesum føri fyriliggur eingin kanning, sigur Jenis av Rana.

Jenis av Rana sigur seg ikki trúgva ræðumyndunum, sum samgongan áhaldandi málar í samband við versandi búskaparstøðuna, sum hann málber seg.

### Harðrendur Fólkaflokspolitikkur

Landsstýrið hevur boða frá, at tað versandi búskaparstøðan er høvuðsorsøkin til, at neyðugt er við skerjingunum innan tað almenna. Jenis ásannar, at búskaparstøðan í Føroyum hevur verið betri, men hann er sannførdur um, at samgongan ger støðuna verri, enn hon í veruleikanum er.

– Hetta er eitt spæl fyri gallarínum. Búskapurin hevur tað ikki eins ringt, sum samgongan vil gera tað til. Teir gera lønarframskrivingarnar nógv verri enn tær í veruleikanum verða. Samgongan misnýtir eftir mínum tykki búskaparstøðuna til føra ein harðrendan fólkaflokspolitikk í løtuni. Eitt er, at búskaparstøðan ikki er hin besta í løtuni, men tú kanst sanniliga eisini skapa hann verri enn hon er, vísir Jenis av Rana á.

Spurdur, um tað er rætt at skerja miðfyrisitingina í trá við búskaparstøðuna, svarar Jenis av Rana, at meginreglan má vera, at kanningar eru grundarlag fyri skerjingunum.

– Tú mást eisini ansað eftir, at tú ikki sparir teg í hel. Eg eri av teirri áskoðan, at vit eiga ikki fremja skerjingar í niðurgongdstíðum, tí so økjast trupulleikarnir. Í niðurgongdtíðum skalt tú fyrst og fremst stabilisera búskapin. heldur Jenis av Rana

### Blokkniðurskurður

Fleiri vilja verða við, at blokkniðurskurðurin er høvuðsorsøkin til versnandi búskaparstøðuna í Føroyum.

Jenis av Rana heldur tað var eitt álvarsamt mistak av samgonguni, sum hann, at blokkniðurskurðurin ikki varð sendur út til fólkaatkvøðu, áðrenn samgongan gjørdi av at skerja heildarveitingina við 366 mió. krónum.

– Varð niðurskurðurin gjørdur við fólksins vilja hevði støðan verið betur í dag. Hevði fólkið sagt nei hevði tað verið ein fantastisk støða at verið í dag. Hinvegin haldi eg ikki, at samgongan skal áhaldandi tosa um blokkniðurskurðin, men rættast hevði verið at smokt upp um armar og farið til arbeiðis, heldur Jenis av Rana.